# Lærdu konufólk at standa og pissa


*Hesi trý eru serfrøðingar í at læra kvinnur at standa uppi og pissa*
*Mynd: Niels Uni Dam*

**Føroyska deildin av P-mate hevði sølulið á Roskilde Festivalinum, kvinnur og menn í parykkum og p-mate t-troyggjum bóru boðskapin um, at kvinnur eisini kunnu standa uppi og pissa**

ROSKILDE FESTIVALUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nógva regnið ávirkaði nógv av sonevndu Events skránni á Roskilde Festivalinum. Vanliga gongur ein rúgva av sjónleikarum, gyklarum og akrobatum runt á festivaløkinum og framførir ymiskt. Men í ár vóru grønu økini umbroytt til stór runudýki, og tí vóru nógvar av hesum framførslum avlýstar. Men fyri føroysku P-Mate fyritøkuna, ið eisini ferðaðist kring festivaløkið, var regnið eingin forðing. Føroyska fyritøkan selur kvinnum grønar traktir, ið tær kunnu standa og pissa í gjøgnum. Í ár vóru tey á mannsterk møtt upp á festivaløkinum. Konufólkini, ílatin ljósareyðar blusur og parykkar og menninir í svørtum blusum og parykkum, høvdu úr at gera við at læra konufólk at standa uppi og pissa. Vit hittu eitt av søluliðunum uttan fyri Pavillion pallin, beint áðrenn Boys In A Band skuldi spæla. Tey lótu væl at áhuganum millum kvinnur fyri grønu traktunum. Eisini Regin Dalsgaard, ið saman við systir sínari Sylviu stendur fyri føroysku deildini av P-mate, var vælnøgdur, tá vit hittu hann.

- Tað er stuttligt at síggja, hvussu sterkt hetta brandið er. Øll, sum eg tosi við um hetta, kenna til P-mate, greiður Regin frá.

Á veg á konsertina við The Who leygarkvøldið sóu vit tvær vinkonur fara at pissa við eitt hegn á festivaløkinum. Meðan tann eina setti seg niður at húka, stóð hin sum ein maður og pissaði. Henda seinna fór at gnísta, og rópti:

- Det virker jo ikke! Meðan hon við buksunum hálvavegna niðri vendi sær móti vinkonuflokkinum við einum drippandi p-mate í hondini. Um tað var høga promillan ella kleyvarskapur, ið var orsøk til vátliga óhappið vita vit, ikki, men sambært P-mate fólkunum, so skuldi hetta ikki verið so trupult, og flest øll tyktust annars væl nøgd við grønu traktirnar.




Dugir tú at greina búskap og at fara í dýpdina?

**BÚSKAPARFRØÐINGUR VIÐ GÓÐUM KT-FØRLEIKUM**

Ein týðandi partur í arbeiði Landsbankans er at framleiða og greina hagtøl. Hetta arbeiði krevur holla vitan um KT, men eisini um búskaparfrøði. Tú skalt vera før/ur fyri at viðgera og greina, búskaparligar og fíggjarligar samanhangir í føroyska búskapinum sum heild og fyri geirar í búskapinum. Tín uppgáva verður í stóran mun at meta um váðar og útlit í búskapinum fleiri ár fram í tíðina.

Tú skalt vera við til at menna telduskipanirnar í Landsbankanum, serliga tær sum verða nýttar til at innsavna, viðgera og kunngera hagtøl. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á stovninum.

Landsbankin er ein ágrýtin og hollur stovnur við dugnaligum starvsfólki. Arbeiðið er fjølbroytt og vit eru einans 11 starvsfólk. Vit arbeiða tískil tætt saman um okkara týðandi uppgávur.

**Førleikakrøv**
Sum búskaparfrøðingur í Landsbanka Føroya skalt tú hava hesar førleikar:
- Góðan kunnleika til búskap
- Góð analytisk evni
- Góðar KT-førleikar
- Góð samstarvsevni

Umsøkjarar skulu hava búskaparfrøðiliga útbúgving á universitetsstigi (cand.polit., cand. merc ella aðra líknandi útbúgving).

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einum fakliga sterkum umhvørvi. Møguleikarnir fyri eftirútbúgving eru góðir. Løn sambært sáttmála.

**Meira at vita**
Tú ert vælkomin at venda tær til Sigurd Poulsen, stjóra, á telefon 308120 ella senda eitt teldubræv til sigurd@landsbankin.fo. Eisini ber til at vitja heimasíðu okkara www.landsbankin.fo, har eitt nú bygnaðurin og uppgávurnar hjá Landsbanka Føroya eru neyvari lýstar.

**Umsóknarfreist**
Send okkum tína umsókn við avriti av viðkomandi skjølum og prógvum. Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 30.07.2007

Landsbanki Føroya
Staravegur 5
Postsmoga 229
FO-110 Tórshavn

Landsbanki Føroya er stjórnarbanki landsins, ið hevur til endamáls at virka sum bankasamband hjá landsstýrinum, umframt at virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum og støðugari búskapargongd í Føroyum.

Sansir.fo

Landsbanki Føroya
GOVERNMENTAL BANK

Landsbanki Føroya | Staravegur 5 | P.O.Box 229 | FO-110 Tórshavn | Faroe Islands | www.landsbankin.fo | landsbankin@landsbankin.fo



RUKO LÁSATÆNASTA

Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem



Vit eru serkønir á økinum

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ • TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20